# UMSÓKN

## um teknan av sjálvbodnari arbeiðsloysistrygging og stuðul til sjálvstøðug vinnurekandi. (korona)

### Vegleiðing

**Rætt at tekna sjálvbodna trygging sum sjálvstøðug vinnurekandi og harvið rætt til stuðul hevur tann, sum:**

1. hevur fylt 16 ár, men ikki 67 ár
2. hevur bústað í Føroyum
3. hevur inntøku frá persónligum arbeiði sum sjálvstøðugt vinnurekandi her í landinum, einsamallur ella saman við øðrum
4. ikki fær rikið sítt virksemi til fulnar vegna avleiðingar at teimum átøkum, sum eru sett í verk fyri at basa spjaðing av COVID-19 smittuni.
5. ikki er sjúkrameldaður
6. ikki er sett/-ur í sóttarhald ella er mæltur til at fara í sóttarhald orsakað av COVID-19

Arbeiðsloysisskipanin kann krevja neyðug skjalprógv fyri sjálvstøðuga vinnuvirksemi.

Gjaldið til tryggingina er kr. 3.000,-, sum skal gjaldast, samstundis sum tryggingin verður teknað.

Sum sjálvstøðugur vinnurekandi hevur tú rætt til stuðul sambært hesi skipan frá tí degi, hendan umsóknin er komin ALS í hendi og afturvirkandi við í mesta lagi 14 døgum frá hesum degi ella frá tí degi, sjálvstøðuga vinnuvirksemið hjá tær er skert orsakað av COVID-19, um hesin dagur er seinni enn fyrrnevndu. Arbeiðsloysisskipanin kann í serligum førum víkja frá hesi freistini.

Stuðulin, ið verður veittur sambært hesi skipan, verður skerdur við inntøkum, sum tú vinnur tær rætt til, eftir at tú hevur fingið rætt til stuðul sambært hesi skipan. Tað áliggur tær alt fyri eitt at boða Arbeiðsloysisskipanini frá aðrari inntøku, tá rætturin til slíka inntøku er vunnin.

Hevur ella fært tú rætt til sjúkradagpening undir sjúku, skalt tú alt fyri eitt boða Arbeiðsloysisskipanini frá hesum. Í hesum tíðarskeiði fellur rætturin til stuðul sambært hesi skipan burtur.

Broytingar í sjálvstøðuga vinnuvirkseminum ávirka útgjaldið av stuðulinum, sum verður útgoldin 14. hvønn dag og skulu tí fráboðast beinanvegin.

ALS hevur heimild til at útvega allar neyðugar upplýsingar um viðurskifti hjá arbeiðsgevara og starvsfólki, herundir eisini upplýsingar frá TAKS.

Um tú gevur ALS skeivar ella misvísandi upplýsingar ella tegir um umstøður av týdningi fyri rættindini til stuðul, kunnu upphæddir, sum av órøttum eru útgoldnar, verða kravdar afturgoldnar.

Somuleiðis kanst tú verða revsað/-ur við sekt ella hefti.

Vinarliga vend tær til Arbeiðsloysisskipanina og fá nærri at vita, um tú ivast.

### 1 Persónligir upplýsingar

| Føðingardagur og P-tal | | | Fartel |
|---|---|---|---|
| Navn | | | |
| Gøtunavn og húsanummar | | | |
| Postsmoga | Postnr. | Býur/bygd | |
| Teldupostur | | | |

**Send við telduposti til als@als.fo**

**GG! Minnist til at goyma pdf-skjalið, áðrenn sent verður til Arbeiðsloysisskipanina.**

Arbeiðsloysisskipanin
Tinghúsvegur 14 · Postsmoga 3022 · 110 Tórshavn
Tel 349550 · als@als.fo · www.als.fo

ALS

## 2 Vinnuvirkið

| | | | |
|---|---|---|---|
| Navn | | Gøtunavn og húsanummar | |
| Postsmoga | Postnr. | Býur/bygd | |
| Virkið sett á stovn (mð/ár) | V-tal | Er virkið MVG-skrásett? JA ☐ NEI ☐ | Tel |

Greið nærri frá sjálvstøðuga vinnuvirkseminum hjá tær:

Eigur tú vinnuvirkið einsamallur ☐ ella saman við øðrum ☐

Um saman við øðrum, hvørjum:

## 3 Viðmerkingar

## 4 Upplýsingar um sjálvstøðuga vinnuvirksemi

| | | |
|---|---|---|
| Nær var sjálvstøðuga vinnuvirksemið skert orsakað av koronasmittuni? | / | |
| Hvussu nógv er tað skert? (lutfall) | | |
| Hevur tú annað lønt starv afturat tínum sjálvstøðuga vinnuvirksemi? | | JA ☐ NEI ☐ |
| Um ja, er talan um fulltíðarstarv? JA ☐ NEI ☐ | Um nei, hvør er starvsbrøkurin í mun til fulla tíð? | |
| Hvussu stórt er vavið av sjálvstøðuga vinnuverkseminum hjá tær í mun til fulla tíð? | | |
| Hvussu nógvar tímar um vikuna brúkar tú til títt sjálvstøðuga vinnuvirksemi? | | |
| Hvør hevur inntøkan hjá tær av sjálvstøðuga vinnuvirkseminum verið seinastu 12 mánaðirnar? (tilskila bæði A- og B-inntøku) | A-inntøka<br>B-inntøka | |
| Hvør hevur inntøkan hjá tær verið síðani 1. januar 2020 (tilskila bæði A- og B-inntøku) | A-inntøka<br>B-inntøka | |

**Send við telduposti til als@als.fo**

**GG! Minnist til at goyma pdf-skjalið, áðrenn sent verður til Arbeiðsloysisskipanina.**

## 5 Hevur tú í løtuni rætt til, ella hevur tú søkt um onkra av niðanfyri nevndu veitingum?

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Sjúkradagpening** | JA ☐ NEI ☐ | **Útbúgvingarstuðul** | JA ☐ NEI ☐ |

## 6 Lønarkonta hjá tær, hagar stuðulin skal flytast

| | |
|---|---|
| Navn á peningastovni: | Kontunummar: |

## 7 Hvagar skal eftirlønargjaldið hjá tær flytast?

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Betri Pensjón** | ☐ | **Eftirlønargrunnur Havnar Handverkarafelag** | ☐ |
| **Eftirlønargrunnur Føroya Arbeiðarafelag** | ☐ | **Tryggingarfelagið LÍV** | ☐ |
| **HA Pensjón/ Eftirlønargrunnur Havnar Arbeiðarafelag** | ☐ | Peningastovn,<br>Kontunummar: | |

## 8 Limagjald til yrkisfelag (fakfelag)

Ynskir tú, at ALS, tína vegna, skal flyta limagjald (prosentgjald) av stuðlinum til yrkisfelag:

JA ☐ NEI ☐ Um ja, yrkisfelag: Limanummar:

## 9 Váttan

Undirritaði loyvir Arbeiðsloysisskipanini at útvega allar neyðugar upplýsingar um viðurskifti míni, eisini upplýsingar frá skattavaldinum. Eg bindi meg til at geva Arbeiðsloysisskipanini boð um allar broytingar í viðurskiftum mínum viðvíkjandi omanfyrinevndu spurningurm og annars um viðurskifti, sum kunnu hava týdning fyri Arbeiðsloysisskipanina og útgjaldið av stuðli til mín frá ALS.

Upplýsingarnar, latnar í umsóknarblaðnum, kunnu kannast av eftirlitinum hjá ALS við heimild í § 27 í Ll nr. 113 frá 13. juni 1997 við seinni broytingum.

☐ Eg vátti at geva ALS boð beinanvegin, brotingar eru í eitt nú vavinum av sjálvstøðuga vinnuvirkseminum hjá mær.

☐ Eg vátti við trúnaðartreytum at hava lisið leiðbeiningina á síðu 1, og at allar upplýsingar, sum eru latnar ALS í hesum umsóknarblaði, eru sannar.

Dagfesting

**Send við telduposti til als@als.fo**

**GG! Minnist til at goyma pdf-skjalið, áðrenn sent verður til Arbeiðsloysisskipanina.**

**Umvhørvis- og vinnumálaráðið**

**Kunngerð**
**um**
**rætt til stuðul til sjálvstøðug vinnurekandi í sambandi við COVID-19**

Við heimild í § 12 a, stk. 3 í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (ALS-lógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 125 frá 18. mars 2020 og í samráð við stýrið fyri ALS, verður ásett:

*Rætt at tekna trygging*

**§ 1.** Rætt at tekna sjálvbodna trygging sum sjálvstøðugt vinnurekandi og harvið rætt til stuðul sambært hesi kunngerð hevur tann, sum:

1) hevur fylt 16 ár, men ikki 67 ár,
2) hevur bústað í Føroyum,
3) hevur inntøku frá persónligum arbeiði sum sjálvstøðugur vinnurekandi, og
4) ikki fær rikið sítt virksemi til fulnar vegna avleiðingar av teimum átøkum, sum eru sett í verk fyri at basa spjaðing av COVID-19 smittuni.

*Umsókn o.a.*

**§ 2.** Fyri at koma undir hesa trygging skal tann sjálvstøðugi vinnurekandi fylla út og senda Arbeiðsloysisskipanini eitt av Arbeiðsloysisskipanini tilevnað umsóknarblað soleiðis, at tað er Arbeiðsloysisskipanini í hendi í seinasta lagi 14 dagar eftir, at tann sjálvstøðugi vinnurekandi ikki fær rikið sítt virksemi vegna avleiðingar av teimum átøkum, sum eru sett í verk fyri at basa spjaðing av COVID-19 smittuni.
*Stk. 2.* Í sambandi við umsóknina skal tann vinnurekandi vátta at lúka treytirnar í § 1 í hesi kunngerð og § 2 í kunngerð um arbeiðsloysistrygging fyri sjálvstøðug vinnurekandi. Arbeiðsloysisskipanin kann krevja prógv fyri hesum.
*Stk. 3.* Tryggingin kann í fyrsta lagi fáa gildi frá tí degi, Arbeiðsloysisskipanin hevur fingið skrivliga umsókn.
*Stk. 4.* Arbeiðsloysisskipanin kann í serligum førum víkja frá freistini, ásettari í stk. 1 og stk. 3.

*Inngjald*

**§ 3.** Gjaldið fyri tryggingina er kr. 3.000,-.
*Stk. 2.* Gjaldið verður rindað Arbeiðsloysisskipanini, samstundis sum tryggingin verður teknað.

*Útgjald*

**§ 4.** Stuðul sambært hesi kunngerð er 115,38 krónur um tíman fyri í mesta lagi 40 tímar um vikuna. Stuðul verður veittur í sama lutfalli, sum virksemið minkar.

**Send við telduposti til als@als.fo**

**GG! Minnist til at goyma pdf-skjalið, áðrenn sent verður til Arbeiðsloysisskipanina.**

*Stk. 2.* Stuðulin sambært hesi kunngerð verður skerdur við inntøkum, sum tann sjálvstøðugi vinnurekandi vinnur sær rætt til, eftir at hann hevur fingið rætt til stuðul. Tað áliggur tryggingartakaranum at boða Arbeiðsloysisskipanini frá aðrari inntøku, tá rætturin til slíka inntøku er vunnin.
*Stk. 3.* Aðrar inntøkur sambært stk. 2 verða umroknaðar til tímar, í hesi kunngerð nevndir arbeiðstímar, sum stuðul ikki verður goldin fyri. Arbeiðstímarnir verða roknaðir sum vunna inntøkan í útgjaldsskeiðnum, býtt við 132,69.
*Stk. 4.* Um tíðarskeiðið, tann sjálvstøðugi vinnurekandi hevur arbeitt í einum stuðulstíðarskeiði, er longri enn talið av arbeiðstímum, sum verða roknaðir sambært stk. 3, verður stuðul tó ikki goldin fyri hetta tíðarskeið.

*Uppsøgn*

**§ 5.** Trygging hjá sjálvstøðugum vinnurekandi er galdandi so leingi, løgtingslóg nr. 25 frá 18. mars 2020 um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing er galdandi og í mesta lagi eitt ár frá tí degi, tryggingin er teknað.

*Reglur annars*

**§ 6.** Tann tryggjaði hevur skyldu at boða Arbeiðsloysisskipanini frá øllum broytingum í viðurskiftum, sum kunnu ávirka tryggingarviðurskiftini.

*Gildiskoma*

**§ 7.** Hendan kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 12. mars 2020.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, dagfesting

**Helgi Abrahamsen**
landsstýrismaður

**Send við telduposti til als@als.fo**

**GG! Minnist til at goyma pdf-skjalið, áðrenn sent verður til Arbeiðsloysisskipanina.**